


## Vilt tú vera við í stórum ungdómstiltaki í Føroyum??

Ung i Norden verður í Havn 28. juni til 2. juli 2006. Luttakararnir eru 14 til 18 ára gamlir og koma úr øllum Norðurlondum. 20 føroyingar sleppa við.

*Treytir:*
Tú skalt vera fylt/ur 14 men ikki 19 ár, vera "listarliga virkin", og vera til reiðar at samstarva við hinar luttakararnar, bæði áðrenn stevnuna og meðan stevnan er.

Tú kanst vera virkin innan tónleik, sjónleik, myndlist, dans, filmslist, foto, sniðgeving ...

Leiðarar verða settir, sum hjálpa tykkum at fyrireika tykkara íkast, og tit kunnu vænta at hittast regluliga eina tíð, áðrenn Ung í Føroyum byrjar.

Bólkarnir úr hvørjum landi sær føra fram á palli og sýna myndlistaverk fyrstu kvøldini.
Síðan verður arbeitt í verksmiðjum, har tit læra luttakararnar úr hinum londunum at kenna.

Leiðararnir eru millum okkara bestu listafólk.
Á kvøldi er høvi at framføra fyri nýggju vinunum ella saman við teimum á "opnum palli".

Endabrestur verður í Norðurlandahúsinum, har allir 200 luttakararnir sýna fram úrslitini fyri almenninginum.

Ung i Norden 2006 er ein lega. Innivist, máltíðir og verksmiðjur verða á Frælsinum í Havn.
Meira kunning á www.unginorden.fo.

Luttøkugjaldið er 850 kr.

Umsóknarblað er á www.fur.fo og www.maf.fo
Valt verður ímillum tær tilmeldingarnar, sum eru okkum í hendi fyri 1. apríl 2006.

Norðurlandahúsið stendur fyri tiltakinum, við stuðuli úr Mentamálaráðnum, frá Tórshavnar kommunu og Nordisk Ministerråd.

Føroyska bólkin stuðla Jólamerkjagrunnurin, Klaksvíkar kommuna, Leirvíkar kommuna, Sjóvar kommuna, Sands kommuna og Nes kommuna.

FØROYA UNGDÓMSRÁÐ
FUR

*Meginfelag áhugaleikara Føroya*

---

# Koyri-kort?

Teoriskeiðið til persónbil, byrjar mánadagin
**20. marts**
**kl. 17.00**

Teoriskeiðið til lastbil og trailara, byrjar mánadagin
**20. marts**
**kl. 19.30**

Teoriskeið til motorsúkklu byrjar týsdagin
**21. marts**
**kl. 19.30**

SISEKO 2006

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

**Stanley A. Olsen**
koyrilærari
**tel 21 10 99**

**John A. Christiansen**
koyrilærari
**tel 21 47 75**

**Jekaragøta 10 • Tórshavn**

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3629,** Sp/f Vípan, 700 Klaksvík.
**Viðtøkur broyttar:** 01.02.2006
**Navn:**
**Nýtt navn:** Sp/f Kellingará

*Skráseting Føroya*
*tann 14. mars 2006*

*Kristin Balle*

---

**www.sosialurin.fo**

---

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ Starvsfólkadeildin

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktar-frøðingar ella heilsurøktarar/ pleygarar

Á Psyk. D2 eru hesi avloysaratørv leys at søkja:
- 1 farloyvisstarv á starvsbrøki 1,0 frá 1. mai 2006 til og við 30. apríl 2007
- 2 farloyvisstørv á starvsbrøki 0,5 í náttarvakt frá 1. mai til og við 31. desember 2006

Deildin er ein akut viðgerðardeild. Á deildini starvast sjúkrarøktarfrøðingar, pleygarar og heilsu-røktarar. Deildin er ein áhugaverd deild við nógvum avbjóðingum. Vit raðfesta samarbeiði og trivna høgt, og at starvsfólkið er í støðugari menning og arbeiða áhaldandi at betra um terapeutiska umhvørvið á deildini.

Arbeitt verður eftir kontaktpersónaskipanini og miljøterapeutiskum meginreglum. Deildin hevur tætt samstarv við aðrar fakbókar, bæði innan- og uttanhýsis.

**Krøv til umsøkjara:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur/ heilsurøktari/pleygari
- góð samstarvsevnir
- fakligan áhuga innan psykiatriska sjúkrarøkt
- Royndir innan psykiatriska sjúkrarøkt er ein fyrimunur, men tó einki krav

**Við kunnu bjóða:**
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og mennandi arbeiði
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- tvørfakligt samstarv
- ávirkan á fakligu menningina
- góða innleiðslu

Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Meira fæst at vita** um starvið við at venda sær til Birgit Andersen, deildarleiðara á D2, tlf. 304500, lokal 4002, e-post: bian@lsh.fo ella til Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 4102, e-post bergitw@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 31. mars 2006 kl. 12.00.

*Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og Starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti.*

**Skrivlig umsókn,** merkt "umsókn til starv" við avriti av prógvum, CV og viðmælum e.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikkja á leinkjuna "starvsfólk"*